Skúlastýrisfundur 16. apríl 2026

Fundurin byrjar kl 17:00

Møtt eru: Theodor E. D. Olsen, Mass Hoydal, Trygvi í Liða, Tróndur Sigurðsson, Anna Maria Reinert Jensen og Elin Maria Olsen

Skúlabygnaðurin og byggiætlanir

Lærarar hava sent skriv til leiðsluna um at hølisviðurskiftini eru serliga vánalig. M.a. er hvørki rúm fyri at gera orðblindakanningar ella hava foreldraviðtalur. Eingin førleikastova er og inniklimað er ikki gott. Anna Maria sendir skrivið til kommununa.

Anna Maria hevur sett seg í samband við kommununa fyri at skipa hølisviðurskiftini soleiðis at 2. flokkur fær verið í Lítlaskúla.. Soleiðis verða barakkirnar hjá 2. flokki tøkar til t.d. førleikastovu og fundarvirksemi.

Skúlastýrið hevur saman við skúlastýrinum við Løgmannabreyt verið á fundi við kommununa, har tosað varð um at gera bygnaðarbroytingar, soleiðis at báðir skúlarnir í Hoyvík verða lagdir saman til ein skúla. Hetta fyri at styrkja um samanhaldið í Hoyvík og bjóða eitt so gott skúlatilboð sum gjørligt. Hetta er tó bert í kjakfasu.

Vit mugu ansa eftir at eitt kjak um eina møguliga samanleggingin av skúlunum í Hoyvík ikki endar við eini áralangari trætu, sum útsetir skúlabyggingina óneyðuga nógv.

Tróndur boðar frá, at byggingin byrjar ikki í hesum valskeiðnum. Tó ynskir kommunan at fyrireika so nógv nú, at tað er klárt at byrja beinan vegin í næsta valskeiði.

Um pengar ikki eru til skúlan í hesi setuni, skulu vit gera eitt uppróp. Tað gevur ikki meining at brúka kreftir uppá nakað, sum ikki verður.

Skriv er sent við ynski um forskúla til Hoyvíkar skúla. Einki verður gjørt við forskúla fyrr enn nýggi skúlin kemur. Hóast tað, er samtykt at forskúlin skal vera eitt tilboð til øll børn í kommununi.

Foreldur sum vilja hava børnini í Hoyvíkar skúla eru stúrin um hølisviðurskiftini, sum tey eru nú.

Kanning um inniklima er gjørd í skúlanum, hvussu lærararnir uppliva støðurnar skúlastjórin hevvur biðið um nýggja luftkanning. Anna Maria rykkir eftir kanningini og sendir skúlastýrinum teldupost, tá hon veit meira.

Spurningur verður reistur um næmingar mugu flytast úr skúlanum, vegna umhvørvið. Tað meta vit ikki, men hava biðið um neyðugu kanningarnar fyri at finna útav hesum.

Trivnaður í skúlanum:

- Trygvi skjýtur upp at gera eina trivnaðarkanning millum starvsfólkini og næmingarnar
    - Anna Maria vil tosa við aðrar skúlar um hvussu teir gera.
- Skúlin arbeiðir við tí, sum hann veit um, og ger fleiri átøk í løtuni.
- Semja er um, at skúlin umboðar øll fólk í samfelagnum og øll eiga at hava tað gott her.

Felags átak móti keðiligum málburði

- Tað er alment kent at hoyvíkingar hava keðiligan málburð, m.a. í ítróttinum.
- Trygvi hevur tosað við skúlastýrið við Løgmannabreyt
    - Felags fund - evt. hava felags foreldrafund fyri báðar skúlarnar, har høvuðsevnið er málburður. Evt. Kann man bjóða ítróttarfeløgunum við.
        - Vit í Hoyvíkar skúla fara áðrenn summarfrítíðina at fyrireika næmingarnar til at vit fara at krevja meira av teirra málburði.
        - Hetta er í tráð við alment dannilsi.
    - Kenna onnur í Hoyvík til hendan trupulleikan?
    - Skulu vit gera nakað við tað?
- Í mun til truplar næmingar hevur ein lærari skotið upp at arbeiða við málburði.

Tónleikur

- Støðan við tónleikaundirvísing í Hoyvík er óbroytt frá seinasta fundi.

Fundurin er lokin kl 19:00.